## Fyrsta sildin landað

Um mánaðarskiftið september-oktober plagar heystvertíðin hjá íslendsku sildaskipunum at byrja, og soleiðis er eisini í ár. Fyrradagin kom tann fyrsta sildin upp á land, tá trý skip landaðu á Fáskrúðsfirði og í Höfn. Tey høvdu millum 100 og 150 tons í part. Sildin verður skorin til flak og fryst, men á Fáskrúðsfirði varð ein partur saltað í tunnur, skrivar Vísir. Íslendingar rópa hesa sildina Suðurlandssildina, og skipini leita nú á Suðurlandinum.



## Ikki almennan banka

Grønlendska arbeiðsgevarafelagið heldur lítið um hugskotið hjá tingmanninginі hjá Siumut um at stovna ein banka, sum einans grønlendingar skulu eiga. Stjórin í arbeiðsgevarafelagnum, Ole Rud, sigur við KNR, at hugskotið hjá Siumut er beinleiðis vandamikið, tí eitt mál við tí er at forða fyri, at pengar fara úr Grønlandi. Harafturat vísir stjórin í GA á, at tað fer at kosta landskassanum eitt stórt milliónatal at stovna ein banka.

# Ikki komið á mál enn

**Politikararnir á Trapputinginum um psykiatri í Miðlahúsinum í gjárkvøldið – og fyri ein part áhoyrararnir – vóru samdir um, at nógv er hent á psykiatriska økinum seinastu árini. Men øll vóru samd um, at enn er langt eftir á mál**

PSYKIATRI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Stúgvandi fult av fólki miðlahúsinum til Trapputing um psykiatri. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, legði fyri við at greiða frá um ábøturnar, sum eru gjørdar innan økið seinastu árini*

*Mynd: Leo Poulsen*

Tað var Trapputing í orðsins sanna týdningi í Miðlahúsinum í gjárkvøldið, tá fleiri felagsskapir innan økið skipaðu fyri orðaskifti um viðurskiftini hjá teimum sálarliga veiku í Føroyum. Tí fólk máttu bókstaviliga sita í trappuni, vildu tey hoykja bakendan niðurat.

Eftir at Tormóður Stórá hevði bjóðað vælkomin, fekk Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður orðið. Og hann vísti á eina røð av betringum, sum farnar eru fram innan psykiatriska økið seinastu árini.

- Í sambandi við altjóða psykiatriska dagin er vert at vísa á eina gleðiliga, positiva gongd, sum seinastu árini hevur verið á psykiatriska økinum í Føroyum, segði Hans Pauli Strøm.

Síðani greiddi hann frá, at heildarpsykiatriin er raðfest, og at ítøkiligar ætlanir eru stungnar út í kortið í álitinumumheildarpsykiatri frá 2002. Hetta álit leggur upp til at menna allar tríggjar høvuðstættirnar innan psykiatriina samstundis, tað vil siga sjúkrahúspsykiatriina, økispsykiatriina og sosialpsykiatriina. Og av hesum er seinast nevnda hin mest átrokandi.

- Í Føroyum hava vit trupulleikar á psykiatriska økinum, millum annað tí vit nústaðni eru farin í holt við neyðuga økis- og sosialpsykiatri. Hetta elvdi serliga til stórar trupulleikar fyri sjúkrahúspsykiatriina, tí eitt nú orsakað av manglandi bústaðartilboðum til sálarsjúk var avleiðingin tann, at nógv sálarsjúk – eini 40 fólk – vórðu noydd at liggja á sjúkrahúsinum, hóast tey vóru liðugt viðgjørd og kundu útskrivast, segði Hans Pauli Strøm.

### Nýggj sambýli

Síðani nevndi landsstýrismaðurin eina røð av økjum, har betrað var munandi um viðurskiftini. Skjótt kunnu nevnast tvey nýggj sambýli í Sandavági, Deildin fyri Sinnisveik varð sett á stovn, og at játtanin til hendan stovnin verður økt frá 7,4 milliónum í ár upp í 20,3 milliónir krónur næsta ár.

Síðani er stungið út í kortið, at økispsykiatriin skal hava um hendi alla eftirviðgerð av áður innløgdum sjúklingum, og skal veita eitt ambulant fyribyrgjandi viðgerðartilboð til sjúklingar, sum verða ávístir av kommunulækna.

Men umframt sambýlini í Sandavági verður farið undir tvær nýggjar byggiverkætlanir seinni í ár. Ein bygginevnd er liðug við fyrireikingarnar at byggja nýtt sambýli til sinnisveik í Havn.

- Umframt umstøður fyri virknistilboðum, skulu verða sekstan búpláss. Bygt verður í tveimum stigum soleiðis, at farið verður undir fyrsta byggistigið seinni í hesum árinum. Hendan verklagslóg er á veg í tingið, segði Hans Pauli Strøm.

Eisini skal økisdepil fyri sinnisveik byggjast í Vági. Og eisini her er komið so langt ávegis, at farast kann undir byggingina seinast í hesum árinum.

- Ætlanin er at samskipa økispsykiatrisk tænastutilboð við sosialpsykiatrisk virknistilboð og bústaðir, átta til búpláss og tvey til umlætting. Verklagslógin